# Kjak



Dagfinnur Danbjørg

## Samband ella loysing eru í góðum hondum - fólksins hondum

*Sambandsfólk sita við bestu kortunum, tí tey - bert við at skapa ótta um framtíðarfrælsi føroyinganna - kunnu reka fjøld av fólki í sambandsrættina. Fólk eru konservativ av lyndi, og sum ofta verður sagt í ymsum høpi: "Vit vita, hvat vit hava, men vit vita ikki, hvat vit fáa."*

Frammanfyristandandi útsøgn - og óttin fyri fylgjunum - eru vápn sambandsfólksins móti teim frælsissinnaðu. Og óttin er eitt sera sterkt vápn, ið kann fáa mong til at kobla sunnan fornuft frá og síðani blint fylgja teimum ráðum, sum tey, ið óttan skapa, vilja hava fólk at fylgja.

Sølufólk kenna alt til nevndu strategi og fáa flest øll at keypa vøruna, sum søgd verður at gagna og grøða, sjálvt um kanningar vísa, at vøran ikki hevur nakað sum helst virði í so máta. Panepidemiin í fjør, ið vísti seg at vera eitt medicinskt fupnummar, skapti óttan, sum síðani skapti søluna av medisini í milliardaklassanum. Vit vistu av góðum grundum ikki, hvat ið var hvat, og óttin fekk okkum at fylgja boðunum frá teimum, ið skaptu óttan, soleiðis at medisinídnaðurin fekk tann vinning, ið teir vildu hava. Og sambandsfólksins sølufólk fremja sama fuponummar við somu ætlan, og higartil hevur tað gingist væl.

Og tá Edmund nú heilsar Aksel í bløðunum, tí Aksel hevur sagt, at javnaðarflokkurin er ein samríkisflokkur, so fær ein hug at spyrja, og hvat so við dagliga politikkinum. Skal tað vera tann asociala høgra- og arbeiðarafíggindaliga politikkurin, ið Edmund stuðlar á fólkatingið, ið skal vera bindiliðið flokanna millum - ella sami skaðiligi politikkur, sum førdur hevur verið við m.a. skattalættum til tey múgvandi, sum frammanundan - upp á seg - sleppa lættast tá byrðarnar skulu berast?

Ímóti hesum sambandsskapta óttanum eiga allar góðar frælsiskreftir at nýta sakliga upplýsing, upplýsing og aftur upplýsing, tí tað vápnið er langt tað besta í longdini.

Við upplýsing eru mong ósannindir, yvirtrúgv og huldufólk tileinkisgjørd, og mong kúgað og bangin menniskju hava fingið nýggj eygu og trúgv upp á egnan mátt og megi, og síðani handlað hareftir í tí nýggja frælsinum, sum tey hava ognað sær saman við øðrum.

Trupulleikin samband/loysing er í góðum hondum - fólksins hondum.

Tann brennandi spurningurin snýr seg eisini og sera nógv um høgra/vinstra eftir valið. Men tað fer at liggja á hesum sinni.

---



Birgir Waag Høgnesen

## Hans Pauli Strøm, hvat er í vegin við at spara upp?

Viðgang bara, at tit ikki hava gjørt tykkara heimaarbeiði.

Í bløðunum nú um dagarnar stendur tú fram sum tann frelsandi eingilin og sigur, at tað vera tey lágløntu, sum koma at heysta ágóðan av nýggju pensjónskipanini. Tú sigur at "fidusurin við kapitalpensjónini er, at tey hava fingið hinar skattgjaldararnar at gjalda ein stóran part av teirra pensjón".

At ein politikari, ja enntá ein javnaðarpolikikari við ambitiónum, kemur við síni meining um eina framtíðar pensjónskipan, er í míni verð óført, men eg haldi ikki tað er rætt, at tú hartar fólk, sum fyri langari tíð síðan hava sæð, at politikarnir ikki hava verið sína uppgávu vaksnir, heldur ikki javnaðarpolitikarar, nevnliga at dagføra fólkapensjónina.

Longu í mínum ungu árum hoyrdi eg í mínum barnaheimi, at fólkapensjónin var fátækaløn. At fólk kring meg hava tosað soleiðis, hevði helst sína orsøk, tí omma mín í faðirætt misti mann sín við Ernestinu, sum fór á land og sakk í Íslandi 1930. Tá var hon bert 32 ára gomul og sat eftir við fimm synum, 5 ár og yngri.

Sjálvur byrjaði eg at hugsa um míni ellisár sum 18 ára gamal og gjørdi mær eina privata pensjón, men nú sigur tú, at eg havi við "fidusi" snýtt meg til skattafrádrátt, sum onnur hava goldið.

Hvat billar tú tær inn, Hans Pauli? Tú sigur, at "higartil hava vælbjargaðir privatpersónar og fleiri fakbólkar, m.a. akademikararnir og onnur starvsfólk, havt sera lukrativar pensjónsskipanir sum kapitalpensjónir. Tvs., at í staðin fyri eina eftirløn, ið verður goldin í mánaðarligum upphæddum, hava tey spart upp til eina reina kapitalpensjón, sum verður goldin út í einum við veldugari upphædd, tá tey fara frá". Eg haldi, at hetta er ein pástandur, sum tú bara sleingir í luftina, tí tú ikki hevur sett teg nóg væl inn í skipanina við kapitalpensjón.

Tað var tín egni partamaður, javnaðarmaðurin Jákup Lindenskov, sum pressaði á at seta lívstryggingarfelagið Føroya Lívstrygging á stovn í 60'unum. Tað felagið er í dag eitt sera kapitalsterkt felag, sum í løtuni rindar í milliónum út í pensjónum, til fólk sum sjálvi hava hugsað um sín pensjónistaframtíð. Eg siga bara stakkals landskassi, um so var, at øll hesi fólkini skuldu litið á landskassan í hesum døgum.

Ja, enntá er landsstyrismaðurin í vinnumálum í ferð við at selja sama felag, tí peningur er at heinta, eftirsum nøkur okkara hava verið so frek, sambart tær, at teknað kapitaleftirlønir við fidusi. Hans Pauli, tú skyldar okkum eina umbering.

Tú sigur, at "fidusurin við kapitalpensjónini er, at tey hava fingið hinar skattgjaldararnar at gjalda ein stóran part av teirra pensjón: Tí av teirra samlaða inngjaldi til kapitalpensjónina hava tey havt ein skattafrádrátt svarandi til 57% av inngjaldinum, men tey skulu bara gjalda 35% í skatti, tá kapitalpensjónin verður útgoldin. Altso 22% niður í lumman, sum man ikki sjálvur, men hini hava goldið fyri".

Tak í egnan barm, sig tað sum tað er, at hetta landið er heimsins dýrasta land at liva í. Við so vánaligari stýring hava fólk við vanligari arbeiðararløn seinastu árini nevniliga ikki havt ráð at seta pening til síðis til sína egnu privatpensjón, og tí eru politikkararnir komnir til tað genialu idé at gera ein pensjónsreform. At kalla okkum, sum hava sæð, at fólkapensjónin ikki fór at røkka, fyri 'fidusmakarar', tað kalli eg ein frekan politikara, sum skomm ikki er skapt í.

Nú haldi eg, at tað er ov mikið, Hans Pauli Strøm. Tú hartar fólk, sum hava gjørt sína egnu pensjón, og kallar tey fidusmakarar. Ja, so gloyma fólk sjálvandi, hvat tit politikarar fáa í pensjón. Men so lætt sleppur tú ikki. Hettar álopið á okkum, sum hava spart upp, er ein boomerangur, sum vendir beint aftur til politisku skipana, ið ikki hevur gjørt sína skyldu, meðan tíð var.